Fróðskaparsetur Føroya
University of the Faroe Islands

Føroyamálsdeildin
Department of Language and Literature

# Skeiðslýsing Vár 2022
## *Course description*

| | |
|---|---|
| **Skeiðsnummar**<br>***Course number*** | |
| **Heiti**<br>***Title*** | List og modernitetur<br><br>*Art and Modernity* |
| **ECTS**<br>***ECTS*** | 10 ECTS |
| **Fortreytir**<br>***Prerequisites*** | Miðnámsprógv ella samsvarandi. |
| **Stig**<br>***Level*** | BA |
| **Endamál**<br>***Purpose*** | Endamálið við skeiðnum er, at tann lesandi ognar sær ástøðiligt innlit í samanhangir millum list og listahugtøk, ið knýta seg at moderniteti, t.e. broytingar og rák innan list í breiðari merking í 20. øld. Gjøgnum fyrilestrar, verkdømi og kjak lærir tann lesandi at greina list við atliti at áðurnevndu samanhangum og mennir egna fatan av viðkomandi rákum og tíðarskeiðum. |
| **Innihald**<br>***Content*** | Í skeiðnum vera høvuðsástøði í listasøguligum tíðarskeiðum í serliga 20. øld lisin og viðgjørd nærri. Umvegis tekstir, fyrilestrar og kjak veitir skeiðið eina innleiðslu í heimspekiliga, fagurfrøðiliga og ástøðiliga viðgerð av listaligari skapan innan viðkomandi hugtøk sum modernitetur, modernisma, avantgarde, avbyrging, útlegd, endurframleiðsla, urbanitetur, modernitetskritikkur, fólkaendurveking, popplist, minimalisma og postmodernisma. Týðandi tekstir og verk verða lisin og sett í samanhang. Skeiðið fevnir harumframt um framløgur og viðgerð av úrvaldum verkum, har omanfyrinevndu ástøðiligu træðrir eru knýttir og ítøkiliggjørdir. |
| **Læru- og undirvísingarhættir**<br>***Learning and teaching approaches*** | Undirvísingin er skipað í ein fyrilestur við verkdømum og kjaki hvørja viku. Tey lesandi skulu við skeiðsbyrjan velja sær eitt ástøðiligt evni, ið tey hava eina stutta framløgu um fyri restini av flokkinum. Harumframt skal tann lesandi lata inn eina til tvær smærri skrivligar uppgávur, har eitt ástøðiligt evni verður sett í samband við egið listaligt virki. Framløgan |

| | |
|---|---|
| | og skrivligu uppgávurnar telja við í virknu luttøkuni í skeiðnum. |
| **Læruúrtøka**<br>***Learning outcomes*** | Tá skeiðið er lokið, skal tann lesandi vera førur fyri at:<br>• Greiða frá høvuðsrákum innan list og modernitet<br>• Greina grundleggjandi listaástøðilig hugtøk og teirra týdning fyri listaliga skapan<br>• Lýsa leiklutin hjá listini í modernitetinum og meta um sambandið millum list og samfelag |
| **Próvtøkuháttur**<br>***Assessment method*** | Munnlig próvtøka í 30 minuttir (við 30 minuttum í fyrireikingartíð) |
| **Próvdøming**<br>***Examination*** | Uttanhýsis próvdøming |
| **Próvtalastigi**<br>***Marking scale*** | 7-talsstigin |
| **Lestrarlisti**<br>***Bibliography*** | Verður útflýggjaður við skeiðsbyrjan |
| **Ábyrgd**<br>***Contact*** | Knút Háberg Eysturstein |